# Reglugerð fyri útlutan av raðhúsum

## Slag av ogn

1. Tá Tórshavnar kommuna bjóðar út øki til raðhúsabygging, kann kommunan gera av, at raðhúsini skulu lutast út sambært lutakasti, sum kommunan skipar fyri.

## Tilmelding

2. Tá klárt er at luta út raðhúsini, boðar Tórshavnar kommuna frá hesum í fjølmiðlum og á heimasíðuni.

   Ásett verður freist á í minsta lagi fýra vikur, har til ber at melda til lutakast um raðhúsini. Hjúnafelagar og makar telja sum ein og sama tilmelding.

   Tilmeldingin fer fram umvegis sjálvgreiðsluni á heimasíðuni. Við tilmeldingini skal vera váttan frá peningastovni um, at tøk fígging er til ognina.

   Er talan um fleiri støddir ella sløg av raðhúsum, kann skipast soleiðis fyri, at tá ein meldar til, skal ein raðfesta millum ymsu støddirnar ella sløgini. Ein kann tó ikki raðfesta raðhús, sum kosta meira enn váttanin um fígging røkkur til.

## Treytir

3. Treytirnar fyri at melda til og fáa tillutað eitt raðhús eru hesar:

   a) Ein skal vera fylt/ur 18 ár og hava skrásettan bústað í Tórshavnar kommunu í seinasta lagi dagin áðrenn tilmeldingin verður lýst alment.

   b) Ein, ella hjúnafelagi/maki, skal ikki beinleiðis ella óbeinleiðis, t.d. saman við øðrum, gjøgnum partafelag ella á annan hátt, eiga fasta ogn í Tórshavnar kommunu, ið kann nýtast til privatan bústað. Hetta er tó ikki galdandi, um ein bara eigur eina íbúð í kommununi.

   c) Um ein ikki er danskur ríkisborgari, skal ein hava havt skrásettan bústað í Føroyum í minst fimm ár tilsamans.

## Lutakast

4. Rætturin til eitt raðhús verður avgjørdur við lutakasti, sum fer fram við talgildari skipan. Lutakastið kann fara fram alment ella saman við tveimum óheftum eygleiðarum.

   Skilt verður millum fylgjandi bólkar av luttakarum í lutakastinum:

   a) Borgarar, sum ikki eiga fasta ogn í Tórshavnar kommunu, ið kann nýtast til bústað.

   b) Borgarar, sum bara eiga eina íbúð í Tórshavnar kommunu, og tað er har, viðkomandi er skrásettur at búgva.

## Raðfylgja

5. Lutakastið avgerð í hvørjari raðfylgju, luttakararnir sleppa at velja sær sítt raðhús, soleiðis at:
   a) fyrst sleppa tey í bólki a í punkti 4 at velja, sambært raðfylgjuni í lutakastinum, millum raðhúsini, tey hava raðfest.
   b) næst sleppa tey í bólki b í punkt 4 í tí raðfylgu, sum lutakastið avgjørdi at velja millum raðhúsini, tey hava raðfest

   Um tað enn eru fleiri raðhús tøk, tá øll í bólki a og b hava fingið bjóðað raðhús, ella tí onkur letur sítt raðhús inn, kann byggiharrin loyva teimum, sum havi ynski um at býta um við hesi raðhús, at gera tað. Síðan kann kommunan skipa fyri nýggjari tilmelding, sum í mesta lagi er opin í tríggjar vikur eftir sama leisti sum omanfyri. Um hetta ikki útvegar nokk av keyparum, verður loyvt byggiharranum sjálvum at selja raðhúsini í fríari sølu.

   Samlaða úrslitið av lutakastinum verður sent øllum, sum hava meldað til.

*Soleiðis samtykt á býráðsfundi tann 18. juni 2025.*